*Heini á Borg, Eirikur Lindenskov og Hans Elmar Poulsen, tá bilarnir vórðu heintaðir á Vatnsoyrum 31. mars í ár*
*Mynd: Magnus Gunnarsson*




Slíkir Bentley bilar verða nógv nýttir til limousinkoyring – til brúðarkoyringar og til onnur serlig høvi. Hann er eisini sera væl egnaður til hetta endamál. Kabinan er úr leðri, borð er til ferðafólkini á baksetrinum, sum kunnu sita og njóta eitt glas av sjampanju, meðan koyrt verður.

Hinir bilarnir í savninum eru nýggjari bilar frá sekstiárunum og sjeytiárunum. Her er talan um t. d. Mercedes Benz 200 frá 1966, ein Volvo Amazon frá 1967 og Opel Kadett Coupé frá 1968.

Havnar Bilasavn samstarvar við Sp/F Bilrøkt um útleigan av elliskaførunum.

## Bilrøkt skipar fyri útleigan

Tað verður Bilrøkt í Havn, sum fer at standa fyri leigukoyringini av bilunum. Bilrøkt hevur fleiri leigubilar koyrandi og fæst annars við klárgerð av bilum og at vaska og polera bilar fyri fólk. Til ber at frætta nærri við at venda sær til Bilrøkt á telefon 588880 ella við at senda ein teldupost til bilrokt@bilrokt.fo




*Chevrolet frá 1931*
*Mynd: Magnus Gunnarsson*




*Ford T frá 1915. Hetta er elsti bilur í Føroyum - og uttan iva elsti bilur í Føroyum nakrantíð. Tann fyrsti bilurin í Føroyum - sum kom til landið 6. mai í 1922, var ein Ford T lastvognur*
*Mynd: Álvur Haraldsen*




*Opel Kadett Coupé frá 1968*
*Mynd: Álvur Haraldsen*




*Volvo Amazon frá 1967*
*Mynd: Álvur Haraldsen*